## Nýggi Smyril

# Fyrsta ferðin við trimum Smyrlum

**Ein av teimum sum var við fyrsta túrin hjá nýggja Smyrli var heilsølumaðurin, Jógvan Weihe úr Havn. – Hetta er eitt ótrúliga gott skip, sigur hann**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*




*Fyrsti bilurin kemur í land av fyrsta túrinum hjá nýggja Smyrli. Snari á baki komu 85 aðrir bilar. So fult var av bilum, at vóru nakrir fáir bilar fleiri, so sluppu ikki allir við, tí so nógvur farmur var við*

**Smyril:** - Hesin nýggi Smyril er at meta sum ein kollvelting fyri ferðasambandið til Suðuroyar.

- Og eg trúgvi eisini at rætt hevði verið at latið Smyril siglt ein túr um vikuna á enska meginlandið um summarið, sigur Jógvan Weihe.

Hann hevur gjøgnum árini siglt mangar túrar um Suðuroyarfjørð, og hevur í roynd og veru verið á fyrstu túrunum hjá trimum teimum seinastu Smyrlunum.

Og hann var sjálvandi við í gjárkvøldið, tá nýggi Smyril fór av Havnini á fyrsta sinni.

- Jú, tað er munur á skipum. Hetta er snøgt sagt ein kollvelting, sigur hann.

### Fyrsti túrur

Áðrenn Jógvan Weihe byrjaði egna heilsølu arbeiddi hann sum sølumaður hjá Landshandlinum í Havn.

Hetta arbeiðið førdi hann fleiri ferðir til Suðuroyar, og soleiðis bar tað eisini til at hann var við, tá Dúgvan sigldi á fyrsta sinni í síni tíð, og tá gamli Smyril legði frá landi fyri 30 árum síðani.

- Onkur heldur, at hesin nýggjasti er ov stórur og at hann fer at sigla tómur.

- Tað veit eg líka. Í kvøld er hann so rættiliga fullur av fólki, og tað vóni eg eisini fer at verða í framtíðini, sigur Jógvan.

### Selja oynna

At suðuroyingar nú fáa so gott samband sjóvegis fer eisini at krevja, at suðuroyingarnir sjálvir taka seg saman, soleiðis at teir hava nakað at bjóða teimum vitjandi.

- Teir mugu simpelthen taka seg saman og selja oynna sum ferðavinnumál. Suðuroyggin er vøkur, friðarlig og deilig, og so eru suðuroyingar eisini serdeilis blíðir.

- Teir hava nakað at vísa øðrum, og tað átti at kunnað fingið bæði føroyingar og útlendingar hendavegin, sigur Jógvan Weihe.

Hann veit um at nógv fólk í hansara eldri hava aldrin verið í oynni.

- Nú hava tey so ein fínan møguleika til tað. Hetta er eitt gott skip. Í kvøld livir tað eitt sindur í sjónum, hóast væl er av vindi. Men tað er einki at tosa um.

- Hetta er eitt gott skip, sigur hann.

***Myndir: Jens Kristian Vang***



*- Eg havi siglt fyrstu túrarnar við trimum teimum seinastu Smyrlunum, sigur heilsølumaðurin, Jógvan Weihe*

---

**Fyrsti túrurin hjá nýggja Smyrli**

**Dagur:** Mánadagur 31. oktober 2005 kl. 19:00
**Fráferð og koma:** Kl. 19:25 av Havnini. Rampan niður á Krambatanga kl. 21:50.
**Ferðin:** Mett verður, at túrurin frá bryggju til bryggju fer at taka um tveir tímar. Henda fyrsta túrin gekk eitt sindur longri, tí at teir sigldu við trimum motorum í ein hálvan tíma.
**Ferðafólkatal:** 364
**Bilar:** 86 persónbilar; 12 vøruvognar; 4 lastbilar; 8 trailarar; 3 20 fót mafi; 1 40 fót mafi.
**Veðurlíkindi:** 13 til 18 metrar av landsynningi. Eystfallsbroddur, har tað rak upp í ættina.
**Meting:** Við gamla Smyrli hevði hetta verið ein sjasktúrur. Við nýggja Smyrli ein túrur á stovugólvi.

# Kensluborið farvæl við gamla Smyril

**- Nýggi Smyril er eitt stórt frambot fyri allar suðuroyingar, sigur bygdaráðslimur í Sumba**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*



*- Tað er neyðugt við góðari samferðslu, serliga tá hugsast skal um vinnulívið, sigur Jacob Poulsen úr Sumba*

**Smyril:** - Jú, tað var kensluborið at siga farvæl við gamla Smyril. Men hann hevðu nú tænt fyri seg!

- Nú, ið hesin nýggi er komin, fer hann at verða okkum suðuroyingum at gagni og eisini øllum Føroya fólki, sigur Jacob Poulsen úr Sumba.

Sum bygdaráðslimur í Sumbiar kommunu veit hann alt um tann týdningin, sum góð viðurskifti innan samferðsluna hava.

Og fyri hann er tí eingin ivi um at henda nýggja ferjan fer at hava stóran týdning, serliga fyri vinnulívið í oynni.

- Vit mugu ikki gloyma, at Suðuroyggin er ein partur av Føroyum, og tí kemur m.a. fiskurin úr Suðuroynni eisini at hava sín týdning, tá tosast skal um útflutning okkara, sigur Jacob.

### Frambrot

Nógvir suðuroyingar ynskja at Smyril skal sigla tríggjar túrar um dagin.

Jacob heldur tó at ein eigur ikki at byrja við trimum túrum dagliga beinanvegin.

- Men tá summarið kemur eigur Smyril at sigla munandi oftari, - tríggjar túrar um dagin. Eingin ivi um tað, sigur hann.

Á henda hátt kann vinnulívið í oynni sleppa skjótt og lætt av við framleiðslur sínar. Tað verður eisini lætt hjá føroyingum og fremmandum ferðafólki at koma aftur og fram.

- Eg vænti tí avgjørt, at hetta verður eitt stórt frambrot fyri allar suðuroyingar í framtíðini, sigur hann.



*Smyril er bygdur til framtíðina, eisini til hesa lítlu gentuna, sum her rindar ferðaseðilin hjá mammu síni*